# Landmátari

*Starv sum landmátari er tøkt innan matrikul- og útskiftingarøkið. Arbeiðið fatar serliga um málsviðgerð, uppmáting og marknaásetingar. Eisini fatar starvið um matrikulera ráðgeving og aðra lendisfyrisiting.*

### Førleikar

Umsøkjarin skal hava prógv sum landmátari, verkfrøðingur ella líknandi útbúgving frá hægri læristovni. Eisini er tað ein fyrimunur at hava royndir við matrikulerum arbeiði, útskifting og uppmáting við GPS, Totalstatión og Microstatión.

### Starvsmøguleikar

Vit vænta at umsøkjari er ábyrgdarfullur, hevur góð samstarvsevni og hevur hug at menna tað matrikulera arbeiðið í Føroyum. Vit kunnu tryggja eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar, møguleikar fyri persónligari menningar og sjálvstøðugum arbeiði.

### Setan

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Fyrispurningar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:
Jákup Paula Joensen,
stjóra, jakuppj@matrikul.fo
og tlf +298 35 79 10, ella
Bjarna Hansen, deildarleiðara,
bjarni@matrikul.fo og tlf +298 35 79 19.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 29. oktobur 2007. Umsóknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir

Ella teldupost: post@matrikul.fo

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo

# Løgfrøðingur

*Starv sum løgfrøðingur innan umhvørvismál er leyst at søkja. Arbeiðið umfatar samlaða fyrisitingarøkið hjá stovninum og kemur serliga at snúgva seg um gerð av vælvirkandi fyrisitingarmannagongdir og ger av løgfrøðiligum lýsingum.*

### Førleikar

Umsøkjari skal hava prógv sum løgfrøðingur ella líknandi frá hægri læristovni.
Eisini er tað ein fyrimunur at hava royndir innan fyrisitingarøkið hjá stovninum.

### Starvsmøguleikar

Vit vænta at umsøkjari er ábyrgdarfullur, hevur góð samstarvsevni og hevur hug at menna tað fyrisitingarliga arbeiðið í Føroyum. Vit kunnu tryggja eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar, góðar møguleikar fyri persónligari menningar og sjálvstøðugum arbeiði.

### Setan

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Fyrispurningar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:
Jákup Paula Joensen, stjóra,
jakuppj@matrikul.fo og tlf +298 35 79 10.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 29. oktobur 2007. Umsóknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir

Ella teldupost: post@matrikul.fo

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo

# Skrivstovufólk

*Søkt verður eftir skrivstovufólki til Umhvørvisstovuna. Arbeiðið fatar serliga um skráseting, journalisering, bóking og annað fyrifallandi skriv-stovuarbeiði. Eisini kemur starvið at fata um avgreiðslu og málsviðgerð innan samlaða virksemið hjá stovninum.*

### Førleikar

Umsøkjarin skal hava kunnleika og áhuga fyri skrivstovuvirksemi, herundir góðan teldukunnleika. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og at viðkomandi er ábyrgdarfullur, røkin og fyrikomandi.

### Starvsmøguleikar

Vit kunnu tryggja eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar, møguleika fyri persónligari menning og sjálvstøðugum arbeiði.

### Setan

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanin er avmarkað til 1 ár, vegna givin farloyvi.

### Fyrispurningar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til: Jákup Paula Joensen, stjóra, jakuppj@matrikul.fo og tlf +298 357910.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 29.oktobur 2007. Umsóknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir

Ella teldupost: post@matrikul.fo

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo



## Starv á Hagstovuni

Til at hava um hendi fíggjarlig hagtøl um tað almenna – land og kommunur – sóknast vit eftir einum vællærdum og áhugaðum starvsfólki.
Fíggjarliga uppgerðin av tí almenna er partur av tjóðarroknskapinum, men er eisini grundarlag undir sjálvstøðugum hagtølum um leiklutin hjá tí almenna í samfelagnum.

Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, har tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

Fyrimunur er at vera útbúgvin í búskaparfrøði ella samfelagsfrøði. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu vera Hagstovuni í hendi í seinasta lagi 1. novembur 2007. Hevur tú áhuga í starvinum og vilt vita meira, vend tær so til Hagstovuna á telefon 352800 og fá fatur á Hermanni Oskarssyni, stjóra, ella John Jacobsen, deildarleiðara.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO